# Tær tvíhjólaðu í Suðuroynni

**Vikuskiftið 6. og 7. september vóru 45 norðoyingar, sum eru fólk norðan fyri Suðuroyarfjørð, í Suðuroynni á motorsúkklustevnu. Norðoyingarnr vóru farnir suður við motorsúkklum. Tey vóru farin suður á stevnu hjá 45 suðuroyingum, ið høvdu 30 motorsúkklur at sita á. Motorsúkklur eru yvirhøvur vøddamiklar. Tað man ikki vera langt av leið at siga, at tær 65 súkklurnar, ið brølaðu um alla Suðuroynna hetta fyrstu vikuskiftið í september umboðaðu sína mátt og megi við einum 3.700 hestakreftum og 65.000 kubikkum**

*Sonne Smith*



*Bæði kvinnur og menn vóru á motorsúkklubaki á Suðuroyartúrinum*

Motorsúkklufólk rópa slíkar stevnur MC-Boogie. Tað ljóðar jú heilt fjákut. Vaksin fólk! Men orðið boogie hevur í roynd og veru sín uppruna frá teimum báðum akslunum aftan á lastbili, afturásunum. Hesir akslar við sínum fýra aftaru hjólum liggja saman undir lastbilinum. Tað allar aftasta hjólparið kann lyftast upp. Hetta eru boogie-hjólini. Altso, hetta orðið, boogie, er ikki so býtt kortini. Tað merkir nakað við at halda saman. Samanhald, tosa vit um. Og satt at siga er samanhald millum hesi mongu, ið hava fingið sær motorsúkklu. Einar 300 súkklur eru skrásettar í løtuni hjá Bileftirliti Føroya.

### Harley Davidson

Ove Ritter í Havn er helst maðurin, sum hevur tikið stig til hesi sonevndu treffini, tað er stevnur. Hesar stevnur hava fingið heitið MC-Boogie, eitt tiltak, sum Ove uppfann í august í 1999. Tá skipaði hann fyri teirri fyrstu stevnuni av hesum slag við til samans 35 luttakarum.

Ove Ritter hevur skyggjað landið við Harley Davidson-súkkluni. Hann hevur HD-umboðið í Føroyum og hevur leigað eina garasju í Havn, haðani fólk hava høvi at leiga tær báðar Harley-súkklurnar, sum har standa undir dustkápu.

Stevnan í Suðuroynni 6. og 7. september var tann áttanda, og tað var fyrstu ferð, at uttanoyggja fólk lógu nátt yvirhøvur. Harley Davidson hevur 100 ár á baki í ár, og ein partur av hátíðarhaldinum var í Suðuroynni, tó at bara fýra Harley Davidson-súkklur vóru við á suðuroyarferðini. Stevnan hevur annars verið eitt ein-dags tiltak higartil, men Suðuroyggin hevur verið, er og verður - eisini tá ið nýggi Smyril kemur næsta ár - útoyggj í ferðsluhøpi. Oyggin er framvegis fjarskotin.

*Áhugin var stórur fyri súkklunum í Suðuroy*









*Sjálvandi skuldi »Harley-Ove« skera fyri – í fínu føðingardagskøkuna, sum Áki Dimon, kondittari, hevði gjørt til dagin*



### Stórfingin móttøka

Hvat er so tað týdningarmesta á slíkari stevnu? Svarið er heilt einfalt: At hava tað hugnaligt saman og hitta onnur góð fólk. Og so sjálvand ikki minst at uppliva náttúruna í hesum frálíka motorsúkklulandi. Í tí føri er Suðuroyggin imponerandi.

Norðoyingarnir settu fyrst sínar 45 súkklur á fóthvílaran uttan fyri Kaffivognin á eystaru bryggju í Havn leygardagin 6. september. Kaffivognurin var annars stongdur sum vant leygardag, men henda leygardagin læt hann upp fyri teimum hjálm- og leðurkløddu. Tey vóru nakað seinkað, tí Smyril lá hjá einum springaraflokki í einar tjúgu minuttir.

Smyrla-menninir høvdu reserverað teimum aðra hillina yvir bildekkinum. Uppi á sessaðust tey í salongini á cafeteria-dekkinum. Tey, sum vildu, og tað vóru mong, sum vildu, fingu sær kalvafisk til døgurða og høvdu tað annars óføra stuttligt saman.

Móttøkan á Drelnesi var stórfingin. Har var svart av fólki. Bjarki Jensen, primus motor á Tvøroyri, sat á odda í tí stóra MC-fylginum har. Veðrið var av tí besta. Sólin skein oman og niðan. Hetta var eisini um tað mundið, tá ið lýðkan lá um okkara leiðir, og heimsparturin stunaði í varma fyri sunnan.

### Naddoddur

Gestirnir, sum vóru komnir í land av Smyrli á Drelnesi, vóru bilsnir og frøddust óført um eitt-tíðina, tá ið teir vórðu bodnir oman í felagshølið hjá bátafelagnum Naddoddi á Tanganum á Tvøroyri, tí her stóð kona Bjarka Jensen, Hansina, brosandi fyri teimum og segði: "Hey, takk fyri seinast og vælkomin."

Hjúnini, Hansina og Bjarki, høvdu skipað væl fyri. Langborðini í hesum gamla húsi, sum tvøramenn broyttu á sinni frá einum sonnum ótøki til landsins bestu felagshølir og neyst, vóru pyntað við livandi ljósum, og suðuroyingarnir høvdu borðreitt við alskyns góðum mati og drekka.

Nevna vit Naddodd slepst ikki undan at hugsa um menn sum eitt nú Viberg Sørensen og Helga Enni. Vit plagdu siga: Eingin nevndur, eingin gloymdur. Nú eru tveir nevndir, kanska mest tí at Viberg er ein av landsins royndastu skiparum, og Helgi er pápi Brand og Trónd Enni. Tann seinni og eldri beiggin eigur eina amerikanskt sniðgivnað Triumph motorsúkklu, sum annars er av tí víðagitna eingilska upprunanum. Tíbetur er Triumph-fabrikkin aftur farin at gera motorsúkklur. Tíverri gavst kappingarneytin BSA (Birmingham Small Arms) við at gera súkklur longu í 1972. Tær Triumph- og BSA-súkklurnar, ið her vóru umboðaðar, eru allar vetaran-súkklur av tí skínandi, dragandi slagnum við tí tiltikna ljóðinum (brølinum).

Undir borðhaldinum í Naddodda-neystinum sunnudagin 7. september 2003, spældi Jógvan Nolsøe gittara og munnhørpu. Løtu seinni kom Brandur Enni og sang Føgru blómu og aðrar góðar sangir saman við Jógvani.

### Ógloymandi

Sama dag, sunnudagin, fóru tveir mans, Jákup Joensen úr Miðvági og vestmenningurin Helgi Magnusarson í kirkju á Tvøroyri á einari bulmiklari Harley Davidson. Súkklan mundi hokna undir hesum báðum kempunum. Spyr ikki hví.

Tey, sum komu í land aftur á Bursatanga í Havn av Smyrli sunnukvøldið 7. oktober, gloyma ongantíð aftur hetta MC-Boogie-tiltakið í Suðuroynni. Tey dundraðu og spunnu um alla oynna á sínum ótrúligu maskinum, og hevur nakað tiltak rós uppiborið, eru tað hesar stevnur. Fólk gloyma alla gerandiskvøl. Hetta er dagdvølja við lít.

Tey gloyma heldur ikki Áka Dimon, kondittara, sum varð kosin road-captain á ferðini. Virkið hjá Áka, hjá Kondittaranum, hevði gjørt Harley Davidson-føðingardagskøkuna. Og tey eiga ikki at gloyma Jonny, konu Áka. Hon er tann sera dugnaligi leiðarin á Kunningarstovuni á Tvøroyri.

Gestirnir gistu í Øravík á Gistingarhúsinum hjá Una Mortensen, soni rutubilavetaranin Hans Erik Mortensen, ið eisini átti hotellið í Øravík í síni tíð.

Eitt tað mest spennandi á ferðini var, at Bjarki Jensen proklameraði stovnandi aðalfund tann 10. september 2003, tá ið motorsúkklufelag varð stovnað í Suðuroynni. Hetta felag fer helst at senda sítt fólk á stevnu næsta ár.

Biker-stevnan verður væntandi og vónandi á Selatræ, siga tey.



*Rættulig innrás av motorsúkklum var í bygdunum í Suðuroy – her í Fámjin*